# Uttangarðsútskifting
# í
# Hvalba




## *Úti í Haga*

matr.nr.
20-521

**Mánadagin 30. okt. 2017 kl. 13.00 varð útskiftingarfundur settur á kommunuskrivstovuni í Hvalba at viðgera mál um býti av haganum *Úti í Haga*, matr. nr. 521, Hvalba.**

Møtt: 10 eigarar og áhugaði møttu á fundi.

Nevndin var fullmannað, og er hon skipað soleiðis:

**Petur Nielsen**, formaður
**Jógvan Jákup Lauritsen**, nevndarlimur
**Malan Jógvansdóttir Thomsen**, nevndarlimur

Nevndarlimirnir vita seg ikki vera so nær skyldar ella svágdar við nakran ognara, at tað nemur gegni teirra.

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan R. Frýdal og Óli Johansen.

Fram varð lagt:

Skjal nr. 1: Váttan um ógegni

Skjal nr. 2: Lýsingar, ið hava staðið í Sosialinum 6. okt. og í Dimmalætting 6. og 13. okt. 2017, í kunngerðatalvuni í Hvalba og á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni og Hvalbiar kommunu.

Uppá fyrispurning, um nakar hevði viðmerkingar til lýsingina ella lýsingarháttin, svaraði eingin.

Skjal nr. 3: Grannastevnuviðtøkan frá 3. mars 2016 við tilhoyrandi skjølum og staðfest av Búnaðarstovuni 31. aug. 2016.

Skjal nr. 4: Skriv frá Innlendismálaráðnum, dagfest 1. sept. 2016, har Petur Nielsen er uppnevndur til útskiftingarformann.

Skjal nr. 5: Útskrift úr rættarbókini, 18. sept. 2017, har Jógvan Jákup Lauritsen, Sørvágur, og Malan Jógvansdóttir Thomsen, Elduvík, verða uppnevnd til nevndarlimir.

Formaðurin lýsti síðani fundin lógliga lýstan og settan.

Víst varð til § 10 í útskiftingarlógini um, at útskiftingarkravið kann takast aftur, um øll, sum atkvøddu fyri útskiftingini á grannastevnu, ynskja tað.

Formaðurin greiddi síðani frá mannagongdini í sambandi við útskiftingina og bað fundarfólkið greiða frá haganum og skipanini av honum.

**Úti í Haga**, matr. nr. 521, er 8 merkur stórur og o.u. 267 ha til víddar. Trý festi eru av landsjørð, tilsamans 5 mk 8 gl 4 sk.

Skipanin er sambært yvirlitinum hjá Kára Torsteinssyni 384 áseyð, svarandi til 3 áseyð á gyllinin. Fyrr var kenning, men fyri 8-9 árum síðani tóku aðrir menn við, og tá varð broytt til fela, og skipanin minkað til eini tvey frælsi á gyllinin. Úrtøkan hesi seinastu 2-3- árini hevur tó verið nógv lakari.

Menn lata illa at røktini av haganum. Ringt er at halda fólki til, og skilið hareftir.

Á grannastevnuni var stór undirtøka fyri at krevja útskifting, men á fundinum vóru menn ikki á einum máli um, um býtast skal, ella hvussu hagin møguliga kann býtast. Flestu hildu tó, at fæst eitt hampiligt býti í lag, verður tað til gagns fyri hagan og seyðin.

Onkur helt, at tað var skeivt, at kongsjørð og ogn vórðu løgd í sama haga, tá skift varð seinast í 1960'unum, og at verður hagin býttur nú, eigur ogn at marka til ogn í grannahaganum, og landsjørð móti landsjørð. Eisini varð dentur lagdur á, at býtisgrundarlagið eigur at vera markatal, ikki áseyðatal.

Vegna seks ognarmenn varð lagt fram skrivligt uppskot um býti, har ognin verður býtt frá, og fær haga næst bygdini í Sandvík.

Kjakast varð dúgliga, men tá drúgvur klokkutími varð runnin, sleyt formaðurin fundin og bað eigararnar koma aftur á fund kl. 15.00. Til ta tíð fór útskiftingarnevndin at taka støðu til, um býtt verður ella útskiftingarkravið avvíst.

Nevndin viðgjørdi síðani møguleikarnar fyri býti. Mett verður, at ósemjan er so stór og skilið so vánaligt, at átrokandi er at fáa í lag skipaði viðurskifti. Møguleikarnir fyri hesum eru størri, um færri er í hvørjum parti. Nevndin heldur seg síggja onkrar møguleikar fyri einum býti, um eigararnir duga at vísa á, hvørjir fáa verið í sama haga. Talan kann vera um at býta hagan í tveir ella tríggjar partar.

Fundurin varð settur aftur kl. 15.00, og somu menn møttu.

Formaðurin segði fundarfólkunum, at útskiftingarnevndin hevði avgjørt at býta.

Mælt var eigarunum til at senda nevndini uppskot um, hvussu hagin kann býtast, og hvør verður í hvørjum parti. Freistin at seta fram uppskot er 1. des. 2017.

Fundurin varð slitin kl. 15.30.

Skjøl vm. síggjast á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni: http://us.fo/Utskifting

*Petur Nielsen* *Jógvan Jákup Lauritsen* *Malan Jógvansdóttir Thomsen*

**Nevndin hittist á fundi á Umhvørvisstovuni á Argjum 22. nov. 2018 at viðgera býti av haganum Úti í Haga í Hvalba.**

Á fundinum vóru Malan Jógvansdóttir Thomsen nevndarlimur og Petur Nielsen, formaður.
Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan Frýdal, Óli Johansen, Rebekka á Rógvi Johnsdóttir og Arnold Thomassen.

Tað lá ikki fyri hjá Jógvan Jákup Lauritsen at koma á fund, so tað hevur verið samskift við hann umvegis teldupost.

Gerðabókin varð lisin.

Nevndin hevur fingið trý ynski. Ynskini vórðu lisin upp, og nevndin hevur tikið tey við í viðgerðini.




Skotið verður upp, at hagin verður klovin í tvey, og ikki at leggja ognarjørð og landsjørð saman.

Markið millum hagarnar verður lagt úr fjørðuni niðan eftir Svangaleiti og mitt niðan á slættan. Hagani fer markið uml. 550 m í ein útsynning. Síðani í norðan oman eftir Olmussugilinum og í frágarðin og hagani eftir frágarðinum vestur um Gomlurætt og í fjørðuna.

Landsjørðin - kongsið - verður løgd vestast og ognin eystast.

Markartalið hjá landsjørðini er 05 mk 08 gl og 04 sk og ásett til tveir seyðir á gyllinin, so áseyðatalið verður 176. Tað er umleið ein ha. undir seyðinum.

Markartalið hjá ognini er 02 mk 07 gl og 16 sk. Eisini her eru tveir seyðir á gyllinin, so áseyðatalið verður 80. Her er somuleiðis áleið ein ha. undir seyðinum.

Úti í Haga hevur 32 seyðafrælsi í Glývrabergi. Frælsini verða býtt eftir nýggja markartalinum, soleiðis at ognin fær 10 frælsi, og landsjørðin fær 22 frælsi.

Tiltøk í haganum, rætt, seyðhús, ból, stik o. a. falla til hagapartin, tey eru í.

*Úti í Haga - Ogn* fær tinglýstan rætt til at ganga gjøgnum *Úti í Haga - Kong*s til rakstur og røkt av haganum. Eisini fær *Úti í Haga - Ogn* tinglýstan brúksrætt til verandi rætt.

Ogn og skuld verða býtt eftir markatalinum millum hagapartarnar.

Endaliga býtið verður framt í klipping í 2019

*Petur Nielsen, fm.* *Malan Jógvansdóttir Thomsen*

**Hósdagin 13. desember 2018 kl. 1300 var fundur hildin á kommunuskrivstovuni í Hvalba**.

Fyri nevndina møttu Malan Jógvansdóttur og Petur Nielsen form. Jógvan Jákup Lauritsen var lagstur við krími, og tí barst honum frá at møta.
Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan Frýdal, Óli Johansen, Rebekka á Rógvi Johnsdóttir, Aron D. Jacobsen og Arnold Thomassen.

Tað møttu 9 fólk.

Formaðurin bað vælkomin, og gerðabókin varð lisin.

Síðan var lýsing løgd fram. Formaðurin spurdi um nakar hevði nakað í móti lýsingarháttinum. Eingin svaraði til tað, og formaðurin helt, at hetta kundi týðast sum nei, og lýsti so fundin lógliga settan.

Formaðurin legði skjal nr. 6 – fyribilsplanin og skjal nr. 7 - eigaralistan fram.

Ymiskar meiningar vóru um uppskotið.

Sum áður nevnt, vóru trý ynski komin inn. Øll ynsktu at liggja Norðan fyri Gjógv, og viðmerkingarnar avspegladu hetta.

Ognarmennirnir, sum eisini vildu liggja Norðan fyri Gjógv, men endaðu úti í nesinum, vóru ikki serliga væl nøgdir við fyribilsplanin. Hildið var, at hagin gjørdist ov trongur, og seyðurin ikki fekk reikað undan ættini. Eisini var nevnt, at Skriður var ringt lendi, og at nesið kastar illa av sær um veturin. Betri varð, um tann størri hagin, Úti í Haga - Kongs, verður lagdur út í nesið. Tá gerst hagin víðari, og betri verður hjá seyðinum at reika undan ættini. Onkur helt, at fyribilsplanurin er ringasta loysnin fyri ongarmennirnar.

Fleiri av fundarfólkunum hildu, at best var, um eigararnir settust saman og komu við einum uppskoti um, hvussu hagin kann býtast.

Eftir at tosað hevði verið eina løtu um uppskotið, greiddi formaðurin frá, hvussu leikur síðan fer fram.

Eigararnir hava møguleika at koma við viðmerkingum til skjal. nr. 6 - Fyribilsuppskot og skjal nr. 7 - Eigaralista innan 17. januar 2018. Tá freistin er farin, samlast nevndin, og um tað eru komnar viðmerkingar til fyribilsuppskotið, verða tær viðgjørdar, og ein endaligur útskiftingarplanur verður síðani gjørdur.

Tann endaligi útskiftingarplanurin, eigaralistin og gerðabókin verður løgd á heimasíðuna Umhvørvisstovuni www.us.fo/utskifting. Hetta verður kunngjørt á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni og Hvalbiar kommunu, í bløðum og á svørtutalvu. Freistin at kæra er tá 3. Mánaðir, og tá skal kærast til Yvirútskiftinganevndina.

Formaðurin takkaði fyri góðan fundarsið, og fundurin varð slitin kl. 1345.

*Petur Nielsen, fm.* *Malan Jógvansdóttir Thomsen*

**Nevndin hittist á fundi á Umhvørvisstovuni á Argjum 11. mars 2019 at viðgera viðmerkingarnar til fyribilsplanin til býti av haganum *Úti í Haga* í Hvalba.**

Nevndin møtti fullmannað: Jógvan Jákup Lauritsen, Malan Jógvansdóttir Thomsen og Petur Nielsen, formaður.

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan Frýdal og Arnold Thomassen. Rebekka á Rógvi Johnsdóttir og Aron D. Jacobsen, sum eru í starvspraktikk á Matriklinum, vóru eisini við.

Á fundin í Hvalba var ongin ivi um, at ognarmennirnir vóru ónøgdir við fyribilsplanin, sum varð lagdur fram (skjal nr. 6), meðan teir, ið umboða landsjørðina vóru betri foreintir. Menn tyktust tó at vera á einum máli um, at frægast mundi vera at seta seg saman og royna at gera eitt felags uppskot.

Tá freistin var farin, hevði útskiftingarnevndin ikki fingið eitt felags uppskot, men tríggjar viðmerkingar ella uppskot. Eina frá festarunum, eina frá einum ognarmanni og eina frá restini av ognini.

Viðmerkingarnar vórðu lisnar, og nevndin gjøgnumgekk tær.

Seks ognarmenn føra fram, at um fyribilsplanurin verður endaligur, verða teir fyri vanbýti. Tí vilja teir hava gamla *Stórstovuhagan*, heldur enn tann ringasta partin av haganum, sum teir siga, fyribilsuppskotið gevur ognini.

*Stórstovuhagin* var tvær merkur og bar 96 áseyðir - t.e. 3 á gyllinin. Undir uttangarðsútskiftingini síðst í 60'unum varð Stórstovuhagin lagdur saman við *Úti í Haga*. Hagin varð tá mettur at vera stórur til víddar eftir markatalinum.




Festararnir eru nøkunlunda nøgdir við býtið, sum er skotið upp, men ynskja at markið verður regulerað nakað, tí eigarin av matr.nr. 170b ynskir at vera lagdur saman við landsjørðini, har faðir hansara situr við tí eina festinum.

Nevndin ásannar, at fyribilsplanurin neyvan ber á mál, og er samd um at gera nýtt uppskot til býti og leggja fram nýggjan fyribilsplan.

Hagin verður framvegis býttur í tvey - Stórstovuhagin og Út í Haga, og áseyðatalið verður átta bein á gyllinin.

Markið fer nú úr markinum við Klettin á Gjógv 1.200 m í ein landnyrðing einar 70 m sunnanfyri røðina. Haðani í landsynning oman á Svangaleiti og eftir Svangaleiti í sjógv.

Stórstovuhagin verður 2 mk 7 gl 16 sk, og áseyðatalið verður 80.

Úti í Haga 5 mk 8 gl 4 sk, og áseyðatalið 176.

Í Glývrabergi fær Stórstovuhagin 10 frælsir, og Úti í Haga fær 22 frælsir.

Tiltøk í haganum, rætt, seyðhús, ból, stik o. a. falla til hagapartin, tey eru í.

Stórstovuhagin fær tinglýstan rætt at ganga gjøgnum Úti í Haga til rakstur og røkt av haganum. Eisini fær Stórstovuhagin tinglýstan brúksrætt til verandi rætt.

Ogn og skuld verða býtt eftir markatalinum millum hagapartarnar.
Endaliga býtið verður framt í klipping í 2019.

Eigararnir hava møguleika at koma við viðmerkingum til skjal. nr. 8 - annað fyribilsuppskot og skjal nr. 9 - eigaralisti. Viðmerkingarnar skulu sendast til us@us.fo og merkjast útskiftingin av Úti í Haga – Hvalba, og vera nevndini í hendi í seinasta lagi 28. mai 2019.

Skjal nr. 9 - Eigaralisti eftir øðrum fyribilsplani

**Stórstovuhagin - 2 mk 7 gl 16 sk**

| matr. nr. | mk-gl-sk | Eigari |
|---|---|---|
| 3a | 00-10-01 | Katrin Norðfoss |
| 102a | 00-05-17 | Moodi Norðberg |
| 105b | 00-01-00 | Hildur Mortensen |
| 123a | 00-04-10 | Johan Hansen Olsen<br>Janus Levin Olsen |
| 125a | 00-05-12 | Johan Hansen Olsen |
| 169a | 00-06-06 | Erland Jensen |
| 170b | 00-05-12 | Hans Cecil Poulsen |
| 177a | 00-00-18 | Niels Jacob Thomsen<br>Gunnar Olsen<br>Niels Jacob Thomsen<br>Ebba Dorthea Thomsen |

**Úti í Haga - 5 mk 8 gl 4 sk**

| matr. nr. | mk-gl-sk | eigari |
|---|---|---|
| 111a | 01-15-04 | Føroya Jarðargrunnur |
| 134a | 01-12-09 | Føroya Jarðargrunnur |
| 218a | 01-12-11 | Føroya Jarðargrunnur |

*Petur Nielsen* *Jógvan Jákup Lauritsen* *Malan Jógvansdóttir Thomsen*

**Nevndin hittist á fundi á Umhvørvisstovuni á Argjum 26. juni 2019 at viðgera viðmerkingarnar til annan fyribilsplan til býti av haganum *Úti í Haga* í Hvalba.**

Nevndin møtti fullmannað: Jógvan Jákup Lauritsen, Malan Jógvansdóttir Thomsen og Petur Nielsen, form.

Frá Umhvørvisstovuni møttu Jógvan Frýdal og Óli Johansen.

Annað fyribilsuppskot hevur ligið frammi, og nú kærufreistin er farin, eru settar fram tríggjar viðmerkingar.

Seks ognarmenn taka undir við uppskotinum, har ognin fær gamla Stórstovuhagan.

Teir tríggir festararnir góðtaka ikki, at ognin fær hagan hjá Óla (Stórstovuhagan), tí tá verða festini fyri vanbýti. Teir halda, at ognararnir kunnu vera norðan fyri Gjógv, tvs. tættast Sandvík. Teir halda eisini, at ognin matr. 170b (5gl og 12sk) við tilknýti til eitt av festunum, eigur at kunna verða løgd saman við landsjørðini. Teir siga seg fara at kæra, verður hildið fast um annað fyribilsuppskot.

Í eini triðju viðmerking siga festararnir, at teir góðtaka ikki aðra loysn, enn fyrra fyribilsuppskot. Teir vilja tó flyta markið nakað suðureftir niðan av Svangaleiti og vestureftir og niðan á norðaru røð. Við hesum fær seyðurin í Nesinum góð skjól, at reika undan ættini, og raksturi báðumegin verður høgligari.




Nevndin viðgjørdi málið og viðmerkingarnar gjølla, og niðurstøðan er, at hildið verður fast um annað fyribilsuppskot, men at matr.nr. 170b verður flutt úr ognarpartinum og í hagan hjá festunum,

og markið millum Stórstovuhagan og Úti í Haga verður flutt suðureftir, so tað gongur frá tromini niðan av Svangaleiti og í ein lágan vestan, niðan móti røðina, um 580 metra frá Klettin á Gjógv.

**Stórstovuhagin verður 2 mk 2 gl 4 sk, og áseyðatalið 66.**

**Úti í Haga verður 5 mk 13 gl 16 sk, og áseyðatalið 190.**

Í Glývrabergi fær Stórstovuhagin 9 frælsir, og Úti í Haga fær 23 frælsir.

Tiltøk í haganum, rætt, seyðhús, ból, stik o. a. falla til hagapartin, tey eru í.

Stórstovuhagin fær tinglýstan rætt at ganga gjøgnum Úti í Haga til rakstur og røkt av haganum. Eisini fær Stórstovuhagin tinglýstan brúksrætt til verandi rætt.

Ogn og skuld verða býtt eftir markatalinum millum hagapartarnar.

Álagt verður Umhvørvisstovuni at seta markið millum nýggju hagarnar.

Umhvørvisstovan ger upp útskiftingarroknskapin, og verður eigaranna partur av kostnaðinum álíknaður nýggju høgunum eftir markatalinum.

Skjal nr. 11 - Eigaralisti, endaligt býti

**Stórstovuhagin - 2 mk 2 gl 4 sk**

| matr. nr. | mk-gl-sk | Eigari |
|---|---|---|
| 3a | 00-10-01 | Katrin Norðfoss |
| 102a | 00-05-17 | Moodi Norðberg |
| 105b | 00-01-00 | Hildur Mortensen |
| 123a | 00-04-10 | Johan Hansen Olsen<br>Janus Levin Olsen |
| 125a | 00-05-12 | Johan Hansen Olsen |
| 169a | 00-06-06 | Erland Jensen |
| 177a | 00-00-18 | Maren Sigmundsdóttir Thomsen<br>Gunnar Olsen<br>Ebba Dorthea Thomsen |

**Úti í Haga - 5 mk 13 gl 16 sk**

| matr. nr. | mk-gl-sk | eigari |
|---|---|---|
| 111a | 01-15-04 | Føroya Jarðargrunnur<br>Eliesar Poulsen |
| 134a | 01-12-09 | Føroya Jarðargrunnur<br>Álvheðin Thomsen |
| 218a | 01-12-11 | Føroya Jarðargrunnur<br>Frank Poulsen |
| 170b | 00-05-12 | Hans Cecil Poulsen |

Endaliga býtið verður framt í klipping í 2019.

Úrskurðurin verður latin til ákæru.

Kærur skulu vera skrivligar, stílast til Yvirútskiftingarnevndina og sendast Sorinskrivaranum, Postboks 28, 110 Tórshavn.

Tær skulu vera honum í hendi í seinasta lagi 29. september 2019.

Útskiftingin er endað.

*Petur Nielsen* *Jógvan Jákup Lauritsen* *Malan Jógvansdóttir Thomsen*